Kappingarráðið

## TIL KUNNINGAR

**Frá Kappingarráðsfundi tann 9. juli 2008**

Kappingareftirlitið hevur tann 30. juni 2008, móttikið fráboðan, sbrt. kappingarlógini § 14, stk. 1, um samanlegging av arkitektfyritøkunum, sp/f MAP Arkitektar og sp/f Fuglø Arkitektar.

Fyritøkurnar høvdu báðar í 2007 ein umsetning, ið var omanfyri 4. mió. kr. á føroyska marknaðinum, sbrt. Kappingarlógini § 14, stk. 2, nr. 3, síðsta pkt. Sostatt var fráboðanarskylda eftir § 14, stk. 1.

Kappingarráðið metti at samanleggingin ikki hevði munandi ávirkan á kappingina á marknaðinum fyri arkitekttænastur og tekur tí samanleggingina til eftirtektar uttan nærri viðgerð, sbrt. § 14, stk. 2, nr. 1.

Kappingareftirlitið, tann 11. juli 2008

Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo